**Sørvágs Kommuna**
FR-380 Sørvágur . Tlf. +298 32004/33122 . Fax +298 32952

# Kunningarskriv 1999



Triðja árið hjá sitandi bygdaráði verður um skamma stund lagt aftur um, og á gáttuni til sermerkta ársskiftið 99/00 fara vit enn einaferð at gera støðuna upp og sum frægast royna at kunna okkara borgarar.

Bygdaráðið hevur í 1999 havt 13 bygdaráðsfundir og viðgjørt gott hundrað mál av ymsum slag: byggiloyvir - sundurbýti - stuðlar - fíggjarmál - skattamál - leigusáttmálar o. a.

Regluligu bygdaráðsfundirnir í árinum 2000 eru fastlagdir til hesar dagar:

| | |
|---|---|
| Mikudagin 26.01.2000 | Týsdagin 22.02.2000 |
| Mánadagin 20.03.2000 | Hósdagin 13.04.2000 |
| Týsdagin 23.05.2000 | Mikudagin 21.06.2000 |
| Mánadagin 28.08.2000 | Týsdagin 03.10.2000 |
| Hósdagin 09.11.2000 | Mikudagin 13.12.2000 |

Fíggjarætlanin fyri ár 2000. Á bygdaráðsfundi 02.12.99 var fíggjarætlanin hjá Sørvágs kommunu til triðju viðgerð og endaliga samtykt, og er nú eisini góðkend av Føroya Landsstýri. Skattaprosentið verður óbroytt 21, kirkjuskattaprosentið 0,25 og barnafrádrátturin verður 2500 kr. Eisini varð samtykt at gjalda tvær milliónir í eykaavdráttum.

Fíggjarætlanin fyri ár 2000 hjá felagskommununi í Vágum er kr. 205.000. Henda upphædd verður býtt soleiðis, at helvtin verður deild í mun til skattskyldugu inntøkuna fyri árið 1998, meðan hin helvtin verður býtt í mun til fólkatalið í kommununum 01.01.99. Samlaða býtið fyri ár 2000 verður: Sandavágs kommuna kr. 52.480,00 - Miðvágs kommuna kr. 72.272,75 - Sørvágs kommuna kr. 74.138,25 - Bíggjar kommuna kr. 5.073,75 - Mykines kommuna kr. 1.035,25.



Granskoðaði roknskapurin fyri 1998 hjá Sørvágs kommunu var framlagdur og góðkendur á bygdaráðsfundi 14.12.99. Ársroknskapurin vísir ein rakstur sum javnvigar við kr. 21.195.046 og eini fíggjarstøðu, sum javnvigar við kr. 30.730.839. Í fíggjarætlanini fyri 1998 var roknað við einum avlopi áðrenn avdráttir uppá kr. 3.659.000. Roknskapurin vísir eitt avlop uppá kr. 4.247.000.

Arbeitt hevur í longri tíð verið við at fáa skipaði viðurskifti viðvíkjandi sáttmálum við starvsfólkini hjá Sørvágs kommunu, og endiliga frá 01.12.99 er sáttmáli gjørdur millum Starvsmannafelagið og starvsfólk hjá okkum, tó við undantak av havnameistaranum, sum fær sáttmála við Føroya skipara- og Navigatørfelag, tá hann - eftir at hava verið í farloyvi - byrjar aftur fyrsta februar 2000. So eru dagrøktarmammurnar eftir, og tí spurninginum arbeiðir nevndin í barnagarðinum við. Tey siga seg loysa málið í nýggja árinum.

Bókavørður okkara síðstu tíðina Turid Sørensen hevur sagt upp til 01.08.99, og bygdaráðið hevur sett Hildigunn Niclasen sum nýggjan bókavørð. Bókasavnið er opið hvørt mikukvøld kl $18^{30}$ - $20^{00}$

Kommunan hevur roynt at bøta um umstøðurnar hjá útróðrarmonnunum við at seta ein krana á havnalagið til uppskipan, oljusjálvtøkutangi er settur upp í bátahylinum, og kommunan hevur gjørt

leigusáttmála við Sørvágs Laks um gomlu stampagoymsluna, sum er sett í stand og uppdeild í básar, sum útróðrarmenninir so leiga.

Ísvirkið, sum kommunan hevur verið høvuðspartaeigari í, hevur ikki gingið væl fíggjarliga, og nevndin kom tí í árinum til ta niðurstøðu, at bert tvinnir kostir vórðu í at velja: antin at virkið fór á húsagang, ella at nýggjur partapeningur var útvegaður.Bygdaráðið samtykti at taka undir við, at nýggjur partapeningur var fingin til vega, samstundis samtykti bygdaráðið at strika eitt lán til virkið uppá kr. 484.116 og yvirtaka leysaskuldina hjá virkinum uppá kr. 86.000. Nýggju eigararnir í sp/f Vestís eru Vesturvarði - Vesturskin - Vesturvón og arbeiðsmannafelagið í Sørvági.

Arbeiðstól og amboð hjá kommununi eru við tíðini skift út. Í vikuni fingu vit ein nýggjan rennugravara av merkinum New Holland fyri kr. 450.000 og gamli JCBarin verður seldur. Boritornið er selt til ein arbeiðstakara í Havn.

Viðvíkjandi ruskplássinum úti í grótbrotinum er at siga, at nú verður onki koyrt til Biggjar til tyrvingar longur, men alt óbrennbart - eisini stór ting sum køliskáp, komfýrar, frystiboksir o.s.v - verður koyrt í bingju og flutt av oynni, og tí verður heitt á fólk um at skilja og skipa ruskið so væl sum gjørligt, fyri at bingjurnar verða fyltar skilabest.Tað eru tíverri

fleiri fólk, sum sleppa sær av við burturkastið við at seta tað uttanfyri bingjuplássið. Vit heita inniliga á tey, sum henda óskikk hava, um at leggja hann av - bygdini til sóma. Upplatingartíðirnar eru týsdag, mikudag og leygardag kl.17 - 18, og fríggjadag kl.17 - 19. Eisini fara vit í hesum reglubroti at minna á, at tað er strangliga banna at sópa tøð út í áir og vøtn/sjógv og á bø millum hús.

Heitt verður á tey, sum eiga hava út ímóti almennum veg, um at skera burtur vøkstur sum veksur út um garðamarkið, tá hetta er til stóran ampa fyri bilarnar, ið koyra framvið og fáa skeinir av hesum greinum.

Fólkatalið hevur síðstu árini kvinkað seg uppeftir. Í seinastuni hava vit verið u.l. 890 fólk, men við ársenda í fjør vóru 898 fólk, meðan vit 28.12.99 eru 888 íbúgvar. Langt hevur verið ímillum nýggj hus í bygdini, men nú er ein glotti fyri stavn. Eini hús eru í gerð, og eitt til tvey verða sett skjøtil á í tí nýggja árinum. Viðvíkjandi grundstykkjum fara vit at heita á fólk, sum eiga og vilja selja stykkir, sum liggja soleiðis fyri, at farast kann undir bygging, um at siga kommunuskrivstovuni frá staðið og kostnaði. Av og á spyrja borgarar eftir grundstykkjum, og tá kommunan ikki hevur so nógv stykkir tøk, kundi tað verið gott, um vit kundu víst teimum á onnur stykkir, ið eru til sølu.




Ætlanin er komandi ár at gera eina reglugerð fyri kirkjugarðin, og í tí sambandinum verður sagt frá, at byrjanin til hetta verður, at frá ársskiftinum 2000 skulu øll, sum ætla at gera rundan um gravir ella seta upp gravsteinar, fyrst venda sær skrivliga til kommunuskrivstovuna við fyrispurningi og síðan verður tað arbeiðsformaðurin, sum setur av gravstaðið.

Av íløgukarminum uppá 2,6 mill. kr. fyri ár 2000 fer meginparturin til vegaarbeiði, og sum høvuðsarbeiði verður hildið áfram við vegnum norður í Húsadal, har tað drúgvasta pettið er klárt til sproytingar, men sum so kavin forðaði okkum at fáa gjørt; vónandi kann tað gerast ein av fyrstu døgunum. Av øðrum arbeiðum kann nevnast, at í samarbeiði við SEV verður hildið áfram við at leggja loftlinjurnar í jørð, og í tí sambandi verða nýggir elsteyrar uppsettir, so í komandi ári skuldu flestu

loftlinjur í bygdini verið tiknar niður. Eisini liðugtgerð av vatn- og kloakkibindingum út eftir ovara vegi stendur fyri tørni í komandi ári.

Aftur í ár hava vit fingið góðar 200.000 kr. til ung í arbeiði, sum hava verið í holt við at fríðka um í bygdini, og nú síðstu dagarnar hava tey veitt SÍ eina hjálpandi hond við liðugtgerð av SÍ-húsinum. Tey hava verið seks ungfólk - 5 mannfólk og 1 konufólk - saman við einum formanni, sum hava verið í tiltakinum "ung í arbeiði".

Vatnspurningurin í bygdini er drúgvur at loysa, men vit halda á, og nú er so vatnið úr Húsadali loksins komin út á havnaøkið. Úti í Geilini er bygt eitt lítið hús beint uttan fyri garðin, sum er eitt klorreinsiverk til alt havnaøkið, men sum sagt, so er langt eftir á mál, so ein partur av íløgunum komandi ár fara til at betra um vatnumstøðurnar.

Frá fyrireikarunum av nýggjárshaldinum skal verða sagt frá, at blikkini verða tendrað u.l. kl. 23 - 23$^{30}$. Niðri á Oyruni verður bál og á miðnátt verður fýrverkari. Kl. 01 verður farið inn í dansistovuna, har fyrst verður kunngjørt av bygdaráðnum, hvørji av børnunum í Sørvágs skúla hava vunnið 1. - 2 og 3. virðisløn í kappingini, tey høvdu fyri jól. Síðani verður felagssangur - miðnáttarrøða og Sørvágs Tónleikarfelag luttekur. Síðani lutakast millum øll húsarhaldini í bygdini imillum triggjar vinningar,

sum eru: ein bók um Føroyar - tveir flogferðaseðlar við tyrluni Vágar/Suðuroy/Vágar (gáva frá Atlantic Airways) og høvuðsvinningur tveir apex flogferðaseðlar við Atlantsflog Føroyar/Danmarkar og aftur. Endað verður við einum kvæði (Flóvin Bænadiktson).

| | | 1996 Rokns. | 1997 Rokns. | 1998 Rokns. | 1999 framr. | Fí. 2000 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Skuld:** | | | | | |
| 8.269.624 | Føroya banki | 7.843.767 | 7.375.206 | 6.433.107 | 5.311.155 | 4.500.521 |
| 9.486.102 | Tryggingarstovnar | 9.417.255 | 9.417.254 | 8.799.612 | 7.887.863 | 7.014.493 |
| 95.809 | Kommunukredit | 95.809 | 95.809 | 89.613 | 81.506 | 72.466 |
| 16.028.017 | Nykredit | 15.207.046 | 14.301.161 | 12.557.601 | 10.559.920 | 8.940.016 |
| 92.723 | Onnur lán | 19.104 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 33.972.275 | **Lán íalt** | 32.582.981 | 31.189.431 | 27.879.933 | 23.840.445 | **20.527.496** |
| 1.200.000 | Veðhald | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| 324.815 | Ognarar | 430.553 | 370.738 | 286.110 | 55.905 | 107.368 |
| 1.433.038 | Millumrokningar | 1.481.361 | 1.806.851 | 1.565.160 | 1.639.554 | 37.000 |
| 36.930.128 | **Skuld íalt** | 34.544.895 | 33.417.020 | 29.781.203 | 25.585.905 | **20.721.864** |
| 2.663.275 | Tøkur peningur | 4.695.756 | 8.155.680 | 9.926.331 | 6.990.596 | 6.246.530 |
| 1.269.329 | Kreppulánsgrunnur | 1.974.899 | 2.782.488 | 2.782.488 | 2.782.488 | 2.782.488 |
| 677.702 | Skuldarar | 1.780.068 | 1.447.154 | 1.391.194 | 1.506.359 | 1.303.359 |
| 327.273 | Millumrokningar | 413.108 | 621.465 | 400.707 | 494.055 | 530.000 |
| 1.595.104 | Útlán | 1.557.814 | 1.616.580 | 1.569.231 | 1.074.989 | 1.020.000 |
| 6.532.683 | **Ogn íalt** | 10.421.645 | 14.623.367 | 16.069.952 | 12.848.487 | **11.882.377** |
| 30.397.445 | **NETTOSKULD** | 24.123.250 | 18.793.653 | 13.711.252 | 12.737.417 | **8.839.486** |

Útskrivað: 23-12-99

# Sørvágs Kommuna * Fíggjarætlan 2000

**Samtykt 02.12**

| 1995 | | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 73.000.000 | Skattskydug inntøka: | 71.500.000 | 84.054.000 | 89.816.255 | 90.500.000 | 93.700.000 |
| 23% | Skattaprosent: | 21% | 21,3% | 21,3% | 21,25% | 21,25% |
| 2.500 | Barnafrádráttur: | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| 0.05% | Kirkjuskattur: | 0,25 | 0,25 | 0,25 | 0,25% | 0,25% |
| Roknskap.: | | Roknskap.: | Roknskap | Roknskap | Framrokna | **Fíggjarætlan** |
| 1995 | | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | **2000** |
| | **RAKSTUR:** | | | | | |
| 47.544 | 1000. Byggibúning | 18.004 | 58.323 | 50.417 | 82.000 | 66.000 |
| 139.622 | 2000. Kommunal virkir | 55.883 | 467.788 | 609.180 | 842.636 | 391.500 |
| 1.707.773 | 3000. Teknisk mál | 1.784.025 | 2.293.359 | 2.034.522 | 2.549.100 | 2.379.800 |
| 2.084.384 | 4000. Skúla- og mentunarmál | 1.929.382 | 1.979.392 | 2.043.587 | 2.284.360 | 2.493.000 |
| 2.059.030 | 5000. Almanna- og heilsumál | 2.362.473 | 2.288.633 | 2.653.096 | 2.743.072 | 2.145.600 |
| 1.102.580 | 6000. Kommunala fyrisitingin | 1.230.045 | 1.387.658 | 1.627.861 | 1.671.663 | 1.313.000 |
| 0 | 860630. Rentustuðul til landið | 0 | Mótr.innt. | 628.901 | 550.000 | 600.000 |
| **7.140.934** | **A. RAKSTUR SAMANLAGT** | **7.379.812** | **8.475.154** | **9.647.564** | **10.722.831** | **9.388.900** |
| | | | | | | |
| | **ÍLØGUR:** | | | | | |
| 21.885 | 1000. Byggibúning | 16.618 | -28.224 | 235.495 | 197.000 | 233.000 |
| 72.726 | 2000. Kommunal virkir | 182.019 | 522.010 | 722.344 | 798.800 | 435.000 |
| 320.423 | 3000. Teknisk mál | 316.924 | 238.946 | 1.438.532 | 1.912.300 | 1.540.000 |
| 57.793 | 4000. Skúla- og mentunarmál | 95.498 | 176.395 | 216.672 | 208.400 | 416.900 |
| 0 | 5000. Almanna- og heilsumál | 0 | 0 | 0 | 0 | 5.000 |
| 42.344 | 6000. Kommunala fyrisitingin | 52.518 | 34.650 | 0 | 0 | 0 |
| **515.171** | **B. ÍLØGUR SAMANLAGT** | **663.576** | **943.777** | **2.613.044** | **3.116.500** | **2.629.900** |
| **7.656.105** | **RAKSTUR & ÍLØGUR** | **8.043.388** | **9.418.931** | **12.260.609** | **13.839.331** | **12.018.800** |
| | | | | | | |
| **3.390.334** | **C. RENTUR** | **1.932.302** | **1.569.226** | **1.451.692** | **878.920** | **740.363** |
| | | | | | | |
| | **FÍGGJARBROYTINGAR:** | | | | | |
| 1.753.522 | Goldin veðhald | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 649.931 | Goldi í kreppulánsgrunn | 705.570 | 807.589 | 0 | 0 | 0 |
| 997.587 | Øking av likvidum | 2.032.480 | 3.459.924 | 1.770.652 | 0 | 0 |
| 564.442 | Aðrar fíggjarbroytingar | 1.008.370 | 0 | 0 | 1.194.152 | 1.526.830 |
| **3.965.482** | **D. FÍGGJARBROYTINGAR** | **3.746.421** | **4.267.513** | **1.770.652** | **1.194.152** | **1.526.830** |
| | | | | | | |
| 713.976 | Avdráttur | 1.242.408 | 1.393.519 | 1.309.497 | 1.539.488 | 1.312.949 |
| 0 | Eykaavdráttur | 0 | 0 | 2.000.000 | 2.500.000 | 2.000.000 |
| **713.976** | **E. AVDRÁTTUR AV LÁNUM:** | **1.242.408** | **1.393.519** | **3.309.497** | **4.039.488** | **3.312.949** |
| | | | | | | |
| **15.725.897** | **ÚTREIÐSLUR SAMANLAGT:** | **14.964.519** | **16.649.188** | **18.792.449** | **19.951.891** | **17.598.943** |
| | | | | | | |
| | **INNTØKUR:** | | | | | |
| 0 | Hall at fíggja | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| -1.753.522 | Lántøka | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | Minking av likvidum | 0 | 0 | 0 | -2.935.735 | -744.064 |
| -33.093 | Avdráttur av útlánum | -37.290 | 58.766 | -47.349 | -494.242 | -54.989 |
| | Aðrar fíggjarbroytingar | | -368.643 | -785.711 | 0 | 0 |
| -13.939.282 | Skattainntøka (netto) | -14.927.227 | -16.339.315 | -17.959.388 | -16.521.913 | -16.799.889 |
| **-15.725.897** | **F. FÍGGJAN SAMANLAGT** | **-14.964.517** | **-16.649.192** | **-18.792.448** | **-19.951.890** | **-17.598.943** |
| | | | | | | |
| 0 | Javnvág | 2 | -4 | 1 | 0 | 0 |
| **-2.892.843** | **ÚRSLIT áðrenn avdrátt:** | **-4.951.536** | **-5.351.158** | **-4.247.087** | **-1.803.663** | **-4.040.726** |



Hetta var so ein háttur at koma okkara borgarum til tals við orðum og tølum, og so verður tað upp til hvønn einstakan at avgera, hvussu hetta skal sodnast, men er tað nakar, ið saknar ella ynskir meira vitan av almennum slag, ber til at venda sær til skrivstovuna.

Á gáttuni til hetta sermerkta ársskiftið - nú vit nærkast túsundáraskiftinum - fara vit til seinast at ynskja øllum bygdafólkunum eitt av Harranum vælsignað nýggjár, í vónini um at lagnan má laga seg blíð og ljós fyri hvønn einstakan.

Sørvágur tann 30.12.1999

SØRVÁGS KOMMUNA

Petur Kruse, formaður